# Bók um Jósef Stalin

**Fyrsta verk á føroyskum um valdsharran og ríkisovastan, sum meira enn nakar annar myndaði heimssøguna í seinnu helvt av 20. øld**

BÓKAÚTGÁVA
*Sosialurin*

Skal ein kunna skilja dagsins politisku hendingar, sum tær daga á einum altjóða lørifti, er tað viðhvørt ein fyrimunur at hava eitt sindur av baksýnisvitan. Hvat er t.d. orsøkin til teir áhaldandi og blóðugu trupulleikarnar millum Russland og Tsjetsjenia? Hvaðani kemur tann politiska fyrimynd, sum t.d. Kuba og Norðurkorea eru skipað eftir – og sum til fyri stuttum eisini var galdandi í Irak? Hví varð Tibet kollrent, og hví noyddust milliónir at láta lív í Kampuchea árini 1975-78?

Hesar og mangar aðrar spurningar fær ein svar uppá í bókini Jósef Stalin eftir føroyska rithøvundin Hanus Kamban. Upprunaliga var talan um átta greinir, sum komu á prent í Sosialinum í vár, nakað aftaná fimti ára dagin eftir deyða Stalins. Í bókini verður greitt frá uppvøkstrinum og lívinum hjá tí fátæka dronginum úr Georgia, sum endaði við at gerast valdsharri í einum av heimsins størstu ríkjum. Greitt verður frá, hvussu Stalin sum ungur fer upp í ta russisku kollveltingarligu rørsluna, hvussu hansara flokkur í oktober 1917 tekur valdið í Russlandi, og hvussu Stalin, takkað veri lutvís søgunnar tilvild og lutvís persónligum eginleikum, kemur í Lenins stað í 1924 og fær fult ræði í sínum flokki og sínum landi í 1929.


*Hanus Kamban, rithøvundi við nýggju bók síni um Jósef Stalin*

*Mynd Jens K Vang*

Bókin er tó als ikki ein ævisøga í trongari merking. Tvørturímóti eydnast tað høvundinum at viðgera mangar spurningar av søguligum, hugmyndafrøðiligum og prinsipiellum slag. Greitt verður frá, hvussu tann europeiska javnaðarrørslan tíðliga í tíðini klovnar í ein totaliteran og ein fólkaræðisligan vong, og hvussu ein innlendsk messiansk rørsla seyrar inn í ta russisku marxismuna. Somuleiðis verður greitt frá, hvussu tann sovjetski landbúnaðarpolitikkurin skilvíst førir til harðræðið í 30-árunum, útreinsingarnar og GULAG. Umframt Stalin verða eisini Lenin og Trotskij lýstir – sum persónar og hugmyndafrøðiligir leiðarar.

Í bókini verður ikki dult fyri, hvørjar avleiðingar Stalins persónleiki og hugmyndafrøði fingu fyri Russland og heimin. Kortini er hetta verk ikki bara eitt ákærurit, men eisini ein roynd at skilja eitt søguligt og politiskt tíðarskeið. Hetta kemur eitt nú til sjóndar í kapitlinum Barbarossa, har greitt verður frá tí týsku innrásini í USSR í 1941. Høvundurin dylur ikki fyri Stalins stóru moralsku og hernaðarligu mistøkum í hesi lagnustund, men greiðir eisini frá, hvussu tjóðin, herleiðslan og leiðarin spakuliga reisa seg, so at fíggindin at enda má dvína.

Vit skulu ikki dylja fyri, at vit hava lisið hesa bókina við størsta áhuga. Kunnleikin um USSR, Lenin og Stalin hevur – av orsøkum, sum høvundurin nemur við í formælinum – ongantíð verið eins stórur og tann vitan, vit hava um eitt nú Nazitýskland og Adolf Hitler. Við hesum verki verður tí lagað upp í eitt glopp. Bókin er væl og greidliga skrivað, ja, hóast hon sigur frá eini daprari søgu, er hon spennandi og í støðum beinleiðis hugtakandi lesnaður.

Hjá leikum ella lærdum, sum vilja vita meira, ikki bara um hetta tíðarskeið, men eisini um heimin í dag, er bókin eitt gott stað at byrja við.

Jósef Stalin eftir Hanus Kamban er 108 síður og hevur o.u. 30 myndir. Hestprent hevur havt sats, prenting og innbinding um hendur. Útgevari er Sosialurin. Bókin kostar kr. 148.

*Sosialurin*

Jólagávu-hugskot
VØDDAVIÐGERÐ
Nú hava tygum møguleika fyri at geva familju og vinum eitt
GÁVUKORT
sum tey fáa stóra gleði av.
Tú fært eisini ráðgeving um heilsu.
Hervør Jacobsen
Læknaexam. muskelterapeut
Tlf. 213034
Telefontíð: týsdag, hósdag og leygardag
www.hervor.fo • E-mail: hervorj@post.olivant.fo

Ein spennandi greipa …




SKIPALISTIN 2004
hevur lógarkravdan føroyskan álmanakka, streymtalvur og streymkort umframt dagførdar upplýsingar og hópin av nýggjum myndum av føroyska flotanum. Tilfarið í *SKIPALISTANUM* er álítandi og viðkomandi hjá øllum teimum, ið hava áhuga fyri skipi og sjógvi.
*Skipalistin – hentur at hava!*
SKIPALISTIN 2004 kostar kr. 175,-
og innbundin kr. 240,-




JOHN DAM
er ein hin týdningarmesti skiparin og vinnulívsmaðurin í føroysku siglingarsøguni. Hann var undangongumaður í rækjufiskiskapinum, men eisini innan laksa- hemara- og skeljaveiðu gekk hann ótráddar leiðir. Hetta er ein lívssøga um áræði og framskygni, soltnar tíðir og gulltíðir, vónir og vónbrot, eydnu og lagnu. *JOHN DAM* er 400 blaðsíður við hópin av spennandi myndum.
Bókin er innbundin og kostar kr. 295,-
REPROZ
– Fæst í bókabúðunum





# Álit og ábyrgd eru fortreytir fyri sjálvræði

Anfinn Kallsberg hevur skrivað út val at verða 20. januar.

Hetta hevur við sær, at ein rúgva av málsøkjum, sum eftir tvey ára fyrireikingar nú eru klár at yvirtaka, ikki verða yvirtikin í hesum umfari.

Tað hevur eisini við sær, at eitt uppskot til eina ábyrgdarfulla fíggjarlóg, sum skuldi vera enn eitt stig á leiðini ímóti einum sjálvberandi búskapi, fellur burtur.

Tí harmar tað sjálvandi Tjóðveldisflokkin, at Anfinn Kallsberg segði samgonguna upp.

Framvegis er møguleiki fyri, at Føroyar eftir 20. januar verða verandi á teirri mennandi kós, vit hava verið á tey farnu seks árini. Men tað er eisini vandi fyri, at alt verður tveitt fyri borð.

**Samgongan kundi verið bjargað**

Tjóðveldisflokkurin hevur mangan strekt seg langt til tess at halda fast um sjálvstýrismeirilutan. Og í málinum um fortíðina hjá Anfinni Kallsberg fór Tjóðveldisflokkurin so langt, sum tað var gjørligt, til tess at bjarga samgonguni.

Vit søgdu, at Anfinn Kallsberg átti at reinsa seg fyri skuldsetingarnar. Kundi hann ikki tað, átti hann at leggja øll kort á borðið og biðja um treytaleysa umbering fyri, at hann hevði misnýtt løgmansembætið til at leggja lok á sína egnu fortíð. Í triðja lagi søgdu vit, at landsstýrið kundi umskipast við øðrum leiðara.

Tað harmar okkum almikið, at hendan roynd at bjarga samgonguni varð havnað. Tað harmar okkum almikið, at Anfinn Kallsberg heldur valdi at koyra landsstýrismenninar hjá Tjóðveldisflokkinum til hús og skriva út nýval.

**Ein spurningur um álit og ábyrgd**

Tjóðveldisflokkurin hevur gingið á odda tá umræður at rudda í politisku skipanini. Í øllum málum, har ivasom og óreglulig viðurskifti eru staðfest, hevur flokkurin sjálvur tikið avleiðingar. Til dømis hava landsstýrismenn hjá Tjóðveldisflokkinum lagt frá sær, tí teir vildu ganga undan at skapa álit á politisku skipanina og politisku málini hjá samgonguni. Og í eini røð av øðrum málum hevur Tjóðveldisflokkurin kravt, at óreglusemi hevur fingið avleiðingar.

Vilja vit rudda slóð fyri eini ábyrgdarfullari framtíð, mugu vit eisini tora at rudda upp í nútíðini.

Tjóðveldisflokkurin kann ikki og skal ikki rudda í fortíðini hjá øðrum. Men málið um Anfinn Kallsberg snýr seg ikki bara um fortíðina.

Tað er staðfest, at Anfinn Kallsberg alment hevur sagt ósatt um sína fortíð. Og tað hevur hann gjørt sum løgmaður. Tað er staðfest, at øll samgongan og øll tjóðin á sjálvum tjóðardegnum í fjør vórðu tikin til gísla til tess at leggja lok á óreglusemið. Tað er eisini staðfest, at Anfinn Kallsberg hvørki vil leggja øll kortini á borðið ella taka greiða frástøðu frá sínum lógarbrotum. Hinvegin hava hann og flokkur hansara vart hesi lógarbrot. Harvið hava teir givið fólki ta fatan, at tað er í lagi at fremja lógarbrot.

Hetta er so álvarsom misnýtsla av løgmansembætinum og so oyðileggjandi fyri rættarkensluna og álitið á politisku skipanina, at tað kann ikki góðtakast.

**Sjálvstýrisgongdin má halda fram**

Kunnu vit bert náa politiskum úrslitum um vit verja óreglusemi, er betur, at úrslitini bíða nakað enn.

Fortreytin fyri fullum føroyskum sjálvræði er, at vit megna at skapa álit á politisku skipanina. Vit mugu og skulu megna at seta mørk millum rangt og rætt. Vit mugu og skulu ikki renna undan ábyrgdini fyri egnum gerðum - røttum sum skeivum.

Tað vildi Anfinn Kallsberg tíverri ikki. Tí er val útskrivað. Landið liggur í stjórnarloysi, og stór virði kunnu fara fyri skeytið, tí landsstýrismenn eru sendir til hús.

Og tí er vandi nú eisini fyri, at sjálvstýrisgongdin steðgar upp.

Men hon kann framvegis bjargast.

Tjóðveldisflokkurin bjóðar seg fram til valið 20. januar við lyftinum um, at hvør einasta atkvøða verður nýtt í stríðnum fyri, at vit taka ábyrgd av okkara gerðum, okkara landi og av framtíðini.

SISERO 351800

TJÓÐVELDISFLOKKURIN